


# Tú kanst vera við til at avgera vinnaran

**Fyri at atkvøða send eini sms boð til 1930, við kotuni, ið stendur aftan fyri tað navnið, ið tú vilt atkvøða fyri. Hvørt sms kostar 5 kr., og tú hevur loyvi at atkvøða einaferð fyri hvørja planet. Øll føroysk fartelefonhald bæði hjá Føroya Tele og hjá Vodafone kunnu luttaka.**
**Tey, ið eru við í atkvøðugreiðsluni taka samstundis lut í lutakasti um fleiri góðar vinningar**

## Tilnevning besti nýggi bólkur ella einstaklingur:




### Dánjal

Væl móttikna fløgan The Palace og eitt sterkt úttrykk, geva Dánjal á Neystabø eitt greitt pláss á listanum millum tilnevningarnar sum ársins besta nýggja bólk ella einstakling.

Dánjal á Neystabø er ein eksperimenterandi og avbjóðandi listamaður, ið er farin at gera egnan tónleik undir egnum navni. Hann er ikki heilt nýggjur innan tónleikin; eftir nógv ár í Tangz og Ævintýrferðini, fór hann á pall undir egnum navni á Asfalt í fjør, men tað er í ár, hann veruliga hevur tikið seg fram. Fyrr á árinum bleiv hann framúr væl móttikin á Nordklang festivalinum í Sveits, har ein ummælari hjá sveitsiska blaðnum Tagblatt skírdi Dánjal at hava bestu røddina á øllum festivalinum yvirhøvur.

Hann arbeiðir dúgliga við at koma fram í eitt nú Danmark og hevur fingið eitt lið av ógvuliga dugnaligum tónleikarum afturat sær, ið saman við honum hava innspælt væl umrøddu fløguna The Palace.




### Faroe 5

Faroe 5 er enn eitt verk undan hondunum á Føroya fremsta poppsamstarvi, Kára Jacobsen og Eyðfinni Jensen. Bólkurin var stovnaður eftir eina upptøkuroynd, og sniðgivin til endamálið: at skapa ein føroyskan gentubólk, við potentiali at røkka longri enn føroyska marknaðin. Málið er møguliga størri enn føroyski marknaðurin, men fyrstu fótafetini eru tikin her heima, og hava verið sera væleydnaði. Fyrstu stakfløgurnar hava verið nógv spældar í útvarpinum, og nú fløgan er komin á marknaðin er sligið fast, at bólkurin hevur vanligu popp góðskuna, ið vit kenna frá Eyðfinni og Kára við fangandi løgum og frískligum tekstum. Faroe 5 er fyrsti bólkur av hesum slag í Føroyum síðan Poppkorn, ið vunnuð heiðurin besti nýggi bólkur á allar fyrsta Planet Awards.




### Lady Fire

Bert nakrar fáar vikur gamal, vann bólkurin Lady Fire GBOB Føroyar 2008. Í heimsfinaluni gjørdust teir nr 5, og hetta gevur teimum eitt pláss millum tilnevningarnar til planetina sum ársins besti nýggi bólkur.

Bólkurin er spildurnýggjur, men manningin er væl kend á føroyska tónleikapallinum. Lady Fire eru nevniliga Filip Mortensen á vokal (The Ghost, The Story Ends), Heini Martin Niclasen á gittara (Boys in a Band), Hanus Andreasen á tangentar (The Story Ends) og Andreas Dalsgaard á trummur (The Ghost, The Story Ends). Við Lady Fire spæla teir eina víðari útvikling av millum annað The Story Ends og The Ghost. Tað er alternativt og indie, og tað er rokkur.

Við sigrinum á ársins GBOB kapping í Mentanarhúsinum staðfestu teir seg beinanvegin sum eitt spennandi, nýtt navn í føroyskum tónleikahøpi, og teirra 5. pláss í GBOB heimsfinaluni boðaði bert frá, at hetta er ein bólkur, ið er verdur at byggja víðari uppá.




### Moby the pink pilot

Teir komu fram í summar, tá teir spældu á G! Mini. Herfyri vunnu teir nýggju, árligu tónleikakappingina FM08. Nú eru teir tilnevndir til planetina Ársins Besti Nýggi Bólkur.

Moby the Pink Pilot eru Fróði Hansen á vokal og trummur, Bartal Augustinussen á gittara, Petur Háberg á bass og Mattias Kapnas á tangentar. Teir spæla eitt slag av Smashing Pumpkins inspireraðum garasjurokki og gera tað væl. Stílurin er gjøgnumførdur og framúr væl samanspældur. Bólkurin er eyðkendur fyri at levera sera orkuríkar framførslur, ið hava hugtikið mangan áskoðara seinastu tíðina, síðani teir staðfestu sínar tónlistarligu dygdir á G! Mini fyrr í ár.

Fyrr í hesum mánaðinum gjørdust teir vinnarar av nýggju tónleikakappingini FM08, sum varð hildin í Reinsarínum. Potentialið er har, og Moby the Pink Pilot kann gerast eitt navn, ið vit fara at hoyra nógv til framyvir.




### Orka

Orka hevur nøkur ár á baki, sum verkætlan spældi Orka fløgu sína inn á eini konsert í einum fjósi gamlaárskvøld í 2005, og hóast Orka luttók í sangkappingini í sambandi við AME í fjør, so er tað ikki fyrr enn í ár, at fløgan kom út, og bólkurin byrjaði at spæla, tí er hann í uppskoti planeta til besta nýggja bólk ella einstakling. Tónleikurin er slóðbrótandi og spældur á heimagjørd ljóðføri, ið skapa eina heilt serliga ljóðmynd. Bæði føroyingar og umheimurin hava longu varðnast Orku, ið júst hava verið húsorkestust á Transmusicales festivalinum í Rennes í Fraklandi. Framførslurnar her fingu góða umrøðu í nógvum fronskum og bretskum miðlum. Eisini fekk Orka tilboð um, at spæla á Noise of Art festivalinum í Royal Festival Hall í London.